## DAGSINS MEINING

### Læknatrot sum ikki kann góðtakast

Einaferð afturat verður staðfest, at læknatrot er í Føroyum. Hetta ger seg galdandi bæði á sjúkrahúsunum og á summum plássum, serliga í útjaðaranum. Tað merkir, at føroyska vælferðarsamfelagnum vantar bæði sjúkrahúslæknar og kommunulæknar í tí harrans ári 2002!

Á Landssjúkrahúsinum eru bara lesandi - tað merkir ikki liðugt útbúnir læknar - á flest øllum forvaktum á medisinsku deildini, frættist í síðstu viku. Men útbúnir læknar eru tó á millumvaktum og á bakvaktum. Men er hetta nøgtandi? Eitt stórt NEI!

Hvør er so orsøkin til støðuna? Jú, nøkur grundleggjandi viðurskifti í nærsamfelagnum mangla, so tað bæði brakar og buldrar. Fyri 10. ferð verður sligið fast, at yngri læknar koma ikki henda vegin, tí familjan fær ikki børnini ansað. Harafturat er trupult at fáa bústað. ( Men á hesum øki kann so Landssjúkrahúsið tíbetur útvega læknum íbúðir í íbúðablokkunum í Hornabøi, tíbetur).

Tórshavnar kommuna roynir nú - men hon lá ólukksáliga leingi í dvala - at byggja dagstovnar bæði her og har, men hetta nøgtar ikki tørvin. Tí kom tað í seinasta sáttmálan millum felagið hjá yngri læknum og Almanna- og Heilsumálastýrið, at ein dagstovnur skuldi útvegast til Landssjúkrahúsið.

Hóast sáttmálin helst er eini tvey ár, er einki hent enn. Tos og tulkingar henda og handa vegin. Orð og aftur orð, men einki røkist fyri eini loysn. Vit kunnu bara aftur staðfesta, at politiska tilgongdin í Føroyum arbeiðir seint. Ólukksáliga seint. Long tíð gongur frá samtykt til nakað hendir. Hetta kann ikki góðtakast við tí stóru og vælútbúnu manning, sum nú er í miðfyrisitingini, og tí bráfeingistørvi, vit hava á læknum.

Ein av grundstólpunum í tí sosialdemokratiska vælferðarsamfelagnum eru góð heilsu- og sjúkrahúsviðurskifti. Øll - ung og gomul, konservativ og sosialistar, bygdafólk og havnarfólk - vilja hava, at umstøðurnar hjá heilsuverkinum eru so góðar, at vit øll kenna okkum trygg, líkamikið hvar vit búgva.

Men soleiðis er tað ikki í dag. Tí hevur Trivnaðarmálaráðið, sum tað vist eitur í dag, og leiðslan innan Heilsuverk Føroya roynt at bera so í bandi, at nakað munagott hendir, so vit sleppa undan læknatrotunum. Eitt er at yngri læknar kanska ikki koma hendan vegin, tí arbeiðsumhvørvi er kanska ikki nóg lærandi og spennandi. Men at læknar ikki koma henda vegin, tí nakrar grundleggjandi samfelagsligar tænastuveitingar vanta, kunnu vit ikki góðtaka.

**Sosialurin**

# Føroyingar bitnir av marathon



*64 ára gamli Harry Hansen, sum í Berlin rann marathon fyri fyrstu ferð í lívinum, gjørdist nummar 90 í sínum aldursbólki*

**Herfyri vóru sekstan føroyingar við í Berlin Marathon-kappingini, og um vikuskiftið stóðu beiggjarnir Cecil og Hans Petur Weihe seg væl í H.C. Andersen Marathon-kappingini í Odense**

KAPPRENNING
*Hilmar Jan Hansen*

Javnan frættist um føroyskar rennarar, ið fara uttanlands at royna seg í ymsum kappingum. Og eitt nú er tað næstan blivin móti millum føroyingar at vera við í marathon-kappingum, sum eru ymsastaðni.

Sunnudagin vóru beiggjarnir Cecil og Hans Petur Weihe við í einari stórari kapping í Odense, H.C. Andersen Marathon, har samanlagt 2.500 rennarar vóru við.

Og ikki kann sigast annað, enn at Cecil og Hans Petur stóðu seg væl, tí teir blivu ávikavist nummar 85 og 344 av øllum hesum rennarunum.

Cecil hevði tíðina tveir tímar 52 minuttir og 42 sekund, og Hans Petur brúkti tríggjar tímar, 16 minuttir og 55 sekund um at renna teir umleið 42 kilometrarnar, sum marathon-teinurin er.

Cecil var í mei mánaði við í einari marathon-kapping í Keypmannahavn, og tá hevði hann umleið tveir tímar og 50 minuttir um teinin.

### 16 við í Berlin

Størsti føroyski marathonhópurin, sum í ár er farin av landinum til eina kapping, mundu vera teir 16 føroyingarnir, sum síðst í farna mánaði vóru við í stóru Berlin Marathon-kappingini.

Umleið 41.000 fólk høvdu teknað seg til renningina sunnudagin 29. september, og av teimum komu 25.278 á mál - teirra millum allir føroyingarnir!

Bestu føroysku tíðina átti Jonhard Larsen úr Klaksvík við trimum tímum, tveimum minuttum og 30 sekundum, og hann gjørdist samanlagt nummar 1.539.

64 ára gamli Harry Hansen av Toftum mundi kortini fremja størsta bragdið á ferðini, tí í sínum aldursbólki - menn millum 60 og 64 ár - gjørdist hann nummar 90 við tíðini tríggir tímar, 37 minuttir og 50 sekund.

Og so iðraði hann seg á málstrikuni enntá um, at hann ikki hevði lagt meira fyri, tí hann helt seg orka betur enn so, hóast hetta var hansara fyrsta marathon-renning nakrantíð…

Harry er annars pápi Absalon Hansen, sum eigur føroyska metið í marathon-renning, sum hann setti í Berlin fyri fjúrtan árum síðani við tíðini tveir tímar og 26 minuttir.



*Tveir av føroysku rennarunum, Birgir Sondum og Viljálmur Gregoriussen, beint eftir at teir eru komnir á mál í Berlin*

### Føroyskt marathon

Sum skilst, er áhugin fyri marathon-renning stórur millum føroyingar, og ætlanin er aftur at fáa í lag slíka renning í Føroyum, tí eingin hevur verið síðani á Oyggjaleikunum í 1989.

Næsta ár er ætlanin at skipa fyri býar-marathon í Havn, sum ætlandi skal vera ein afturvendandi táttur. Bæði íslendingar og danskarar hava sýnt hesi kapping áhuga, so helst verður eitt sindur gjørt við at marknaðarføra hana uttanlands.

Eisini er ætlanin at halda fram við regluligum hópferðum til útlendskar kappingar, tí hetta tykist vera ein ítróttargrein, nógvir føroyingar hava hug at royna.

Umframt sjálva renningina, eru ferðirnar í sjálvum sær ógloymandi upplivingar fyri tey, ið eru við. At vera ein av 41.000 á startlinjuni er jú eisini nakað, tú ikki dagliga kanst vænta tær at uppliva í Føroyum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Mannarættindi og føroysk lóggáva

Til
Nevndina fyri føroyskari Grundlóg
Jóan Pauli Joensen
Føroya Landsstýri
FR 100 Tórshavn
Føroyar



Í sambandi við at Føroya Landsstýri hevur sett nevnd at gera eina føroyska grundlóg, sum eisini skal fevna um mannarættindi, vil eg gera vart við, at føroysk samkynd eisini finnast í tí føroyska samfelagnum í Føroyum, eins og vit finnast uttanlands.

Vit ynskja at fáa somu rættindi og skyldur sum hinkynd í tí føroyska samfelagnum.

Í sambandi við lóggávuna um mannarættindi og aðrar lógir ynskja vit tí, at har ið skilt verður ímillum ymisk fólk vegna kyn, rasu ella etniskan uppruna, trúgv, evni og aldur, at tað eisini verður nevnt kynslig ábending (sexuel orientering, sexual orientation). Soleiðis verður tað víst á í grundlógini alment politiskt, at vit samkyndu eru góðtikin eins og hinkynd.

Tað er ikki oftani, at grundlógir verða skrivaðar ella verða endurkannaðar og broyttar. At taka mannarættindi við í ta føroysku grundlógina vísir, at tað er eitt nýtímans samfelag, sum vit liva í.

Í fylgjandi teksti vil eg vísa á fleiri dømi, har lond og altjóða stovnar hava tikið okkum við í teirra grundlógir, lógir, direktiv og á annan hátt.

Í Norðanlondum eru vit ikki nevnd í grundlógini, men tað finst heldur ongin lóg í grundlógini fyri mannarættindum og móti mismuni. So tað er ikki løgið, at vit ikki eru nevnd. Hetta skyldast, at lógin er so gomul, at mannarættindi tá ikki vórðu viðgjørd serskilt í grundlógunum. Tí hevur Fólkatingið í staðin gjørt serliga antidiskriminasjónslóg og lóg um paralag.

Danmark hevur verið slóðbrótari fyri viðurskiftum hjá samkyndum, helst tí at Forbundet for bøsser og lesbiske (fyrr Forbundet af 1948) varð stovnað sum ein landsfelgsskapur í 1948 og síðani hevur arbeitt nógv fyri samkyndum.

Í 1976 var tann kynsligi lágaldurin settur til 15 ár í Danmark fyri øll, t. v. s. hinkynd, samkynd og tvíkynd, men lógin er ikki góðtikin í Føroyum (lóg 248, t. 9. 5. 1967). Her er enn munur millum hinkynd, sum hava 15 ár sum lágaldur, og samkynd, sum hava 18 ár sum lágaldur.

Í 1981 varð revsilógin broytt soleiðis, at sama revsing verður givin fyri kynsligar brotsgerðir uttan mun til, um tær viðvíkja hin- ella samkynd (lóg 256, t. 27. 5. 1981).

Í 1981 varð eisini avgjørt í Sundhedsstyrelsen, at tað ikki longur skuldi vera eina sjúka, tað at vera samkyndur (fólkatingsavgerð, t. 24. 5. 1984).

Í 1987 varð ein antidiskriminasjónslóg (lóg móti mismuni) (lóg 357, 3. 5. 1987) góðtikin í Danmark. Í Føroyum fall eitt Landsstýri, tá hon varð framløgd. Bert ein løgtingslimur (Karin Kjølbro) atkvøddi fyri lógini. Síðani er hon ongantíð løgd fyri Løgtingið aftur.

Tann danska lógin sigur:

> Tann, sum alment ella við vilja sendir frásøgnir út, har ein bólkur av persónum verður hóttur, háðaður ella vanvirdur vegna rasu, húðarlit, tjóðskaparligan ella etniskan uppruna, trúgv ella kynsliga ábending, verður dømdur við bót, varðhaldi ella fongsul upp til tvey ár (Revsilógin grein 266b).
>
> Á donskum:
>
> Den, der offentligt eller med forsæt til udbredelse i en videre kreds fremsætter udtalelse eller anden meddelelse, ved hvilken en gruppe af personer trues, forhånes eller nedværdiges på grund af sin race, hudfarve, nationale eller etniske oprindelse, tro eller seksuelle orientering, straffes med bøde, hæfte eller fængsel indtil 2 år. (Straffelovens § 266b)

Samstundis varð lógin, sum bannar mismun á arbeiðsmarknaðinum (lóg 357, t. 3. 6. 1987) broytt, soleiðis at hon eisini tekur kynsliga ábending við, og hon ljóðar nú:

> Tann, sum innan ídnaðar samband ella í sambandi við alment virki vegna rasu, húðarlit, tjóðskaparligan ella etniskan uppruna, trúgv ella kynsliga ábending noktar at avgreiða viðkomandi sum onnur, verður dømdur við bót, varðhaldi ella fongsul upp til seks mánaðir.
>
> Stk. 2. Somuleidis verður tann dømdur, sum av teimum í stk. 1 nevndu orsøkum noktar at geva einum persóni atgongd undir somu treytum sum øðrum til stað, framførslu, sýning, samkomu ella líknandi, sum er opin fyri almenninginum.
>
> Á donskum:
>
> Den, som inden for erhvervsmæssig eller almennyttig virksomhed på grund af en persons race, hudfarve, nationale eller etniske oprindelse, tro eller seksuelle orientering nægter at betjene den pågældende på samme vilkår som andre, straffes med bøde, hæfte eller fængsel indtil 6 måneder.
>
> *Stk. 2*. På samme måde straffes den, som af nogen af de i stk. 1 nævnte grunde nægter at give en person adgang på samme vilkår som andre til sted, forestilling, udstilling, sammenkomst eller lignende, der er åben for almenheden

Í 1989 varð í Danmark lóg um paralag fyri tvey av sama kyni góðtikin. Hon er seinri eisini góðtikin í Grønlandi, men ikki í Føroyum.

Lógin ger tað møguligt fyri tveir persónar av sama kyni at skráseta teirra paralag sum hinkynd gift pør undantikið:

> 1.At eitt skrásett par av samkyndum ikki kann ætleiða fremmand børn (men tann eini partnarin kan ætleiða børn hjá hinum partnaranum),
> 2. At tað ikki er møguligt at fáa eina kirkjuliga vígslu,
> 3. At ein av partnarunum í tí skrásetta partnarskapinum skal vera danskur statsborgari ella statsborgari í einum landi við líknandi lóggávu og liva í Danmark. Tveir útlendingar, sum hava búð í Danmark í minst tvey ár, kunna eisini verða skrásettir..
> 4. Eitt lesbiskt skrásett par kann ikki fáa loyvi til kunstiga inseminasjón í tí almenna heilsuverkinum.

Noreg, Sviaríki, Finland og Ísland hava øll antidiskriminasjónslógir, sum eisini fevna um samkynd, men sum vit í Føroyum sum nevnt ikki hava.

Noreg, Sviaríki og Ísland hava nú eisini lóg um paralag.

Í tí svensku lógini verður tilskilað, at paralag millum samkynd skrásett í øðrum londum automatiskt verða góðtikin í Sviaríki.

Í tí íslendsku lógini er tað lógligt hjá skrásettum samkyndum at fáa felags foreldra-mynduleika yvir børnum hjá tí eina partnaranum, men ikki ætleiða fremmand børn.

Í Evropa hava Holland í 1997 góðtikið lóg um skrásett paralag. Í Fraklandi er í 1999 er ein lóggáva góðtikin, sum minnir um lóg um skrásett paralag, men sum ikki gevur øll tey rættindi, sum tær norðurlendsku lógirnar geva. Samstundis verður nú arbeitt í fleiri øðrum londum í ES og Evropa við at fáa hesa lóg góðtiknað: Onglandi, Týskalandi, Finlandi, Ungarn, Kekkia og Spania.

Av stórum týdningi fyri okkara framtíðarviðurskifti er, at Evropa Sambandið (ES) í Ráðnum, Kommissjónini og Parlamentinum arbeiða fyri okkara viðurskiftum.

Í Amsterdamsáttmálanum stendur í grein 13 (S.2, t. 25. 11. 1999 565 final, 1999/0225 CUS), at tað er bannað at gera mismun. Teksturin í greinini er:

> Við fyrivarni fyri hvat Sáttmálin annars sigur og innan karmin av rættindum, sum Ráðið hevur yvir fyri samfelaginum, kann Ráðið, sum arbeiðir í samsvari við og í felag við fyriskipanir frá Kommisjónini og eftir ráðføring við Parlamentið, gera fyriskipanir fyri at fyribyrgja mismun vegna kyn, rasu ella etniskan uppruna, religión ella trúgv, tørvandi evni (disability), aldur ella kynsliga ábending (sexual orientation).
>
> Á donskum:
>
> "Med forbehold af denne traktats øvrige bestemmelser og inden for rammerne af de beføjelser, som traktaten tillægger Fællesskabet, kan Rådet med enstemmighed på forslag af Kommissionen og efter høring af Europa-Parlamentet træffe hensigtsmæssige foranstaltninger til at bekæmpe forskelsbehandling på grund af køn, race eller etnisk oprindelse, religion eller tro, handicap, alder eller seksuel orientering."

Síðani hevur Kommissiónin t. 25. 11. 1999 framlagt eitt direktiv (council directive) "At seta í verk eina almennan karm fyri javnrættindi viðvíkjandi arbeiði og vinnu" COM (1999) 565 final, 1999/0225 (CNS). Direktivið skal vera galdandi í hvørjum einstøkum landi í ES í seinasta lagi t. 31. 12. 2002.

Tað verður eisini nevnt, at teksturin í direktivinum eisini skal nýtast mótvegis ikki-ES londum í tí Evropeiska Fíggjarliga Umráðnum svarandi til samtykt í EEA Joint Committee.

Hetta merkir, at fyri at gerast limur í ES ella um serligar avtalur ynskjast við ES, skula mannarættindini (grein 13) góðtakast. Hetta er sjálvandi eisini galdandi fyri Føroyar, innan ella uttan fyri ES, í Ríkisfelagskapi við Danmark ella sum serstøk tjóð.

Suðurafrika og Ecuador hava í teirra grundlógum frá ávikavist 1996 og 1998 tikið samkynd við, har tey vísa á, at tað er bannað at gera mismun m.a. vegna kynsliga ábending. Somuleiðis arbeiðir Írland við at endurskoða teirra grundlóg, og har er ætlanin at gera tað ólógligt at gera mismun vegna kynsliga ábending.

Í tí suðurafrikansku grundlógini í grein 9 (3) stendur:

> Staturin má ikki órættvíst gera mismun (diskriminera), beinleiðis ella óbeinleiðis, mótvegis nøkrum á einum ella fleiri av fylgjandi økjum: rasu, kyni, graviditeti, hjúnaðarbandsstøðu, etniskum ella socialum uppruna, liti, kynsligari ábending (sexual orientation), aldri, tørvandi evnum (disability), trúgv, vitan, áskoðan, mentan, máli ella burði.

Vit føroyingar eru eitt serstakt fólk og siga, at vit eru serstøk tjóð (uttan at vera tað, men kanska verður tað skjótt). Vit eiga tí eisini at hugsa alment og við størri hugflogi, enn tað oftani verður gjørt á smáum økjum.

Fyri at gera tað gott at liva í Føroyum fyri flest møguligt, ynskja vit samkyndu tí eisini at verða nevnd í einari føroyskari grundlóg við einari serligari grein, sum viðvíkur mannarættindi. Tí er hetta brævið skrivað fyrst til nevndina, og um hon ynskir tað, so kann nevndin (ella vil eg sjálvur gjarna) senda brævið víðari til Løgtingið, Landsstýrið og eisini almenningin í fjølmiðlunum í Føroyum og uttanlands.

Eg havi fyrr í 1995 bæði heima í Føroyum, m. a. í Dimmalætting og Sosialinum (nr. 223, t. 21. 11. 1995) og í Danmark skrivað longri grein um okkara viðurskifti og mannarættindini. Eg sendi spurninigin víðari til Landsstýrið, Løgtingið, teir politisku flokkarnar og fjøldina. Eg var eisini í longri kjaki við táverandi landsstýrismannin Sámal Petur í Grund í Føroya Sjónvarpi við Høgna Hoydal, núverandi landstýrismanni, sum tíðindamanni. Eitt sindur av kjaki var tá. Men ongin reaksjón kom frá politiskari síðu.

Eitt fólk, sum skal gerast sjálvstøðug tjóð, og sum ynskir millumlanda samstarv, serliga við Norðanlond og ES, má kunna tora tosa um alt, og eisini um viðurskifti hjá samkyndum og teirra mannarættindi.

Tað er ikki neyðugt við fleiri nevndum, og slettis ikki við sokallaðum serkønum.

Vit ynskja sum hinkynd eitt samfelag gott fyri flest øll.

Í desember 1999 vóru 19 føroyingar búsitandi í Føroyum (1), Danmark (16) og í øðrum londum (2) saman á fyrsta sinni sum føroysk samkynd. Síðani hevur verið arbeitt fyri at stovna eitt felag fyri føroysk samkynd: "Felag fyri føroyskar geikarar og lesbisk".

Í sambandi við arbeiðið við einari føroyskari grundlóg er tað tí alneyðugt, at vit sjálvi - vit samkyndu - gera vart við okkum, soleiðis at vit eisini verða nevnd í sambandi vid mannarættindini og ikki verða gloymd og serliga ikki goymd burtur.

Í vón um gott samstarv nú og seinri.


**Bogi Davidsen**
*Estagel, Frakland, mai 2000*
*Yvirlækni, dr. med.*
*Fredriksbergvej 53*
*4180 Sorø,Danmark*
*Tlf.: (0045) 57 82 09 07*
*E-mail: bogi@post9.tele.dk*


Í sambandi við at landsstýrið nøkur ár herfyri setti eina nevnd at arbeiða við føroyskari grundlóg tók Bogi Davidsen, lækni av sínum eintingum stig til at lata hesi nevnd tilfar um mannarættindi, serstakliga við atliti til tey samkyndu. Nú kjak hevur tikið seg upp um hesi mál prenta við frágreiðing hansara